# Pegasus skal senda sunnukvøld

*Klaksvíkingar ætla at gera sunnukvøld til veruligt útvarpskvøld. Studio Pegasus fer at senda í fimm tímar á Rás 2 hvørt sunnukvøld, og dentur skal leggjast á fjølbroytt og seriøst tilfar*

John Johannessen

Studio Pegasus ætlar at gera sunnukvøld til veruligt útvarpskvøldt, tá studio í Klaksvík fer undir at senda á Rás 30. apríl.

Hetta stendur at lesa á heimasíðuni hjá Studio Pegasus.

Rás 2 og Studio Pegasus gjørdu herfyri avtalu um, at Pegasus skal senda fimm tímar við útvarpi hvørja viku, og allir hesir fimm tímarnir verða lagdir sunnukvøld.

Farið verður í luftina klokkan 19.00, og sent verður til midnátt við ymiskum sendingum. Útvarp Føroya sendir ikki sunnukvøld, og tað er helst ein orsøk til, at klaksvíkingar hava valt at leggja seg á hetta kvøldið.

**Stríðast við sendaran**

Vit hava skilt, at talan er um ymiskar sendingar, bæði til børn, ung og tilkomin. Ein undirhaldssending verður á skránni og somuleiðis sending við ítróttartilfari.

Tað verða fólk úr Klaksvík, sum koma at gera sendingarnar í Studio Pegasus, og talan verður um bæði nýggjar og ungar røddir og um fólk við royndum í útvarps- og fjølmiðlaarbeiði.

Í løtuni verður arbeitt við at fáa sendaran settan upp, so farast kann undir at senda Rás 2 til Klaksvíkar og størri part av Eysturoynni.

Rás 2 fer at senda á 107,0 MHz av Brúnaskarði.




*Knappliga eina millión krónur, kostaðr tað at veiða í føroyskum øki uttan loyvi, segði Føroya Rættur, tá skiparin á Bruix fekk dóm. Tað var aðru ferð, at franski trolarin varð tikin, fyri ólógliga veiðu í føroyskum øki*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Bruix gjalda eina millión

*Dómur varð fríggjadagin sagdur í málinum móti franska trolaranum Bruix. Knappa millión vað hann dømdur at gjalda, men enn er ikki greitt um skiparin tekur við dóminum*

Sveinur Tróndarson

Í seinastu viku varð franski trolarin Bruix tikin fyri at fiska ólógliga í føroyskum øki.

Gorm tók franska trolaran, sum ikki hevði loyvið at fiska í føroyskum sjógvi og tók hann við á Havnina.

Málið endaði í rættinum og sum fríggjadagin var dómur sagdur í málinum. Skiparin var dømdur at rinda upp í móti einari millión krónur fyri ólógliga fiskiskapin.

Skiparin fekk einabót upp á 100 túsund krónur, veiðan var virðismett til uml. 800 túsund og fiskireiðskapurin, sum eisini varð tikin, varð mettur til uml. 75 túsund krónur. Samanlagda upphæddin, sum Bruix, skal av við, er knappliga ein millión krónur.

Tó er tað ikki vist, um hetta er seinasta orðið í málinum enn. Skiparin hevur eina freist upp á 14 dagar at kæra dómin.

Reiðaríið hjá Bruix veitti trygd fyri upphæddini og stutt eftir fór Bruix av aftur Havnini.

# Stór páskakonsert á Kambsdali



*Jógvan Hansen fer at spæla saman viðAria á stórari páskakonsert í høllini á Kambsdali.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Leygarkvøldið 15. apríl verður stór páskakonsert í ítróttarhøllini á Hálsi.

Aria, Arnfríð Lützen og Flux fara at spæla.

Dagurin er eitt ára dagurin fyri útgávuni hjá Aria, After These Messages, og tað verður uppruna manningin í Aria, sum fer at spæla hetta kvøldið.

Petur Hans Niclasen, gittarspælari, sum ikki var við seinasta Aria spældi, kemur heim úr Danmark til konsertina.

Arnfríð Lützen hevur sungið á fleiri útgávum seinastu árini, og í Yngd í dag er prát við evnaríku songkvinnuna.

Flux gjørdi vart við seg í Prix Føroyar kappingini í fjør, og teir vunnu seg upp á ovastu rók á hitlistanum hjá Útvarpinum. Nú eru teir farnir at tosa um at fara í upptøkuhølini.

**ek**

# Fyrrverandi Lasmomaður ráðgevi hjá Atlants Kolvetni

Jan Müller

Síðani oljuprísirnir fóru í botn fyri góðum ári síðani eru hendar stórar broytingar í oljuverðini. Mong feløg vórðu løgd saman, nakað, sum førdi til hópuppsagnir. Tær broyttu tíðirnar gjørdu so eisini, at fólk, sum høvdu havt áralangar royndir hjá oljufeløgunum, gjøru av at royna seg sum sjálvsstøðugir ráðgevar.

Hetta er so eisini ein gongd, sum man hevur merkt fylgjurnar av í Føroyum. Ein teirra, sum leingi hevur verið virkin í einum av oljufeløgunum, sum hevur verið við í kanningunum her, Mike Welland hjá Lasmo, er farin at royna seg sum sjálvstøðugur ráðgevi. Í løtuni hevur hann avtalu við føroyska oljufelagið Atlants Kolvetni.

Og tá tað fríggjadagin í farnu viku varð kunngjørt, at m.a. Lasmo hevur tikið seg úr The Faroes Partnership oljubólkinum, var kortini eitt av fyrrverandi umboðunum hjá nettupp sama Lasmo við til tíðindafundin. Mike Welland sigur seg vera fegnan um at kunna geva føroyska oljufelagnum eina hjálpandi hond. Sjálvur hevur hann drúgvar royndir í oljuvinnuni, sum hann vónar kunnu koma føroyska oljufelagnum til góðar.

-Eg havi mítt egna ráðgevarafelag, og royni í løtuni at ráðgeva Atlants Kolvetni á fleiri økjum, tøkniligum sum øðrum. Tað er mín vón, at mongu partaeigararnir í felagnum kunnu fáa gleði av mínari ráðgeving.

Mike Welland heldur annars, at ein orsøk til at LASMO hevur tikið seg heilt úr Føroyaøkinum er tann, at felagið hevur ikki mett, at hetta økið fellur nóg væl saman við tær arbeiðsuppgávur, sum teir hava so nøgva aðrastaðni í verðini. Mike Welland vísir annars á, at øll feløg í oljuvinnuni taka slíkar avgerðir nú og tá, og tað er heldur ikki óvanligt, at onnur feløg finna olju í nettupp økjum, hesi rýma frá. Men hetta er „the nature“ av oljuvinnuni leggur fyrrv. Lasmomaðurin aftrat.

Mike Welland dylur ikki fyri, at hann er sera væl nøgdur við Atlantic Petroleum og teirra máta at arbeiða uppá. -Eg haldi hetta felagið er bygt upp á skilagóðan hátt og eigur eina sera týdningarmikla framtíð.

Vilhelm Petersen, stjóri í Atlants Kolvetni sigur seg vera væl nøgdan við at hava fingið Mike Welland sum ráðgeva, nú hann hevur luttikið í arbeiðinum við Føroyar frá miðjan 90-unum. Hann hevur neyðuga tøkniliga førleikan, sum Atlants Kolvetni ikki hevur í løtuni.



*Mike Welland hjá Lasmo, er farin at royna seg sum sjálvstøðugur ráðgevi.*





*Vilhelm Petersen, stjóri í Atlants Kolvetni er nøgdur við gongdina hjá felagnum og*

# Atlants Kolvetni við í oljuleiting frá byrjan

*-saman við Amerada Hess, Dong og British Gas. Aðalfundurin í føroyska oljufelagnum afturvaldi nevndina í farnu viku. Felagið ger seg nú út til at vera við í komandi oljuleiting og hevur sum uppgávu at lýsa og kunna samstarvsfeløgini um møguleikarnar at brúka føroyska vørur og tænastur*

Jan Müller

Atlants Kolvetni hevði aðalfund seinasta fríggjadag. Vilhelm Petersen, stjóri sigur seg vera nøgdan við fundin og ikki minst við árið, sum farið er. Felagið hevur havt nógv hægri inntøkur í 99 í mun til 98. Úrslitið vísir eitt avlop uppá slaka mill. kr. fyri skatt. Tað eru teir nøgdir við.

Í løtuni hevur felagið bara inntøkur av kapitalavkasti, tvs. primert av statslánsbrøvum og landskassalánsbrøvum. Felagið er so eisini farið undir at gera íløgur í partabrøv, og tað er gjøgnum íløgufeløg, soleiðis at vágin verður avmarkaður. Íløgufeløgini talan hevur verið um hava verið í nøgvum londum og nøgvum bransjum, soleiðis at vágin svarar til tann vágan, sum nevndin hevur stungið út í kortið. Alt í alt verður mett, at peningurin er plaseraður soleiðis, at tamarhald er á váganum og at avkastið er nøktandi vísir Vilhelm Petersen á.

Nevndin hevur lagt tann politikk, at tað kunnu gerast íløgur í partabrøv uppá 30%. Restin tvs. 70% verður so ílagt í lánsbrøvunum.

Hetta vórðu partaeigararnir kunnaðir um á aðalfundinum. Á fundinum fingu teir eisini at vita, at The Faroes Partnership verður við í komandi útbjóðing og er talan um eitt sterkt samtak. Teir fingu eisini at vita um broytingarnar, har British Gas avloysir Norsk Hydro og Lasmo.

Alt í alt verður bólkurin sera sterkur, og verður uppgávan hjá føroyska felagnum primert at taka sær av lokalum innihaldi tvs. vísa á, hvussu tað føroyska samfelagið kann koma uppí komandi virksemið.

Vilhelm Petersen sigur, at teir eru í ferð við gera eina lýsing av á hvørjum økjum føroysk vinna kann luttaka. Hetta er ikki minst týdningarmikið í hesi støðuni, har bólkurin skal søkja.

Vit spurdu stjóran í Atlants Kolvetni, um partaeigararnir skulu kenna seg tryggar við, at teir hava plaserað sínar pengar rætt, nú tá hugsað verður um, at hitt føroyska oljufelagið hevur valt eitt heilt annað modell?

-Tað modellið vit valdu frá byrjan er eftir míni meting so avgjørt tað rætta fyri eitt nýtt føroyskt oljufelag. Í míni verð kundi eg ikki hugsað at gjørt tað øðrvísi. Útgangstøðið er tað føroyska økið. Vit hava við tí avtalu vit hava fingið við samtakið møguleika at taka ein ognarpart, um so er, at tú finnur olju. Tað vildi verið burturvið at brúkt pengarnar hjá partaeigararunum, áðrenn tú visti, at nakað er at brúka pengarnir til.

Atlants Kolvetni vil ikki upplýsa ta ovara markið fyri teirra luttøku í Partnership bólkinum, men felagið hevur so rætt til at økja tess lut upp til eitt ávíst prosenttal, sum stendur mát við ta fíggjarligu orkuna hjá Atlants Kolvetni.

Vilhelm Petersen sigur, at tað er ikki rætt, at teirra felag bara hevur avmarkað seg til tað føroyska økið. Man hevur frá byrjan havt eina ætlan um at kunna fara aðrastaðni at hyggja eftir íløgumøguleikum, og tað hava víst seg at vera fleiri møguleikar, sum verða kannaðir í løtuni. Man hevur so mett føroyska økið sum eina góðan máta at byrja uppá.

Í ársfrágreiðingini til aðalfundin verður annars sagt: at samstarvsavtalan við Faores Partnership gevur Alantic Petroleum :

rætt til at koma inn í samtakið á jøvnum føti við hinar luttakararnir, við einum avmarkaðum ognarparti, men við møguleikanum seinni, tá kunnleikin til møgulig oljufund eru meira vís, at økja henda ognarpart. Hon gevur felagnum møguleika fyri at byggja upp neyðuga vitan og førleika til at kunna luttaka í oljuleiting og framleiðslu á føroyskum meginlandsstøði, og hon gevur betri møguleika fyri at nøkta tann kapitaltørv, ein møgulig øking av ognarpartinum í samtakinum krevur.

Síðani januar í 99 hevur Atlants Kolvetni luttikið í arbeiðinum í bólkinum og herundir havt rætt at møta á tekniskum fundum og leiðslufundum.

Í dag er partapeningurin í Atlants Kolvetni 46,25 mill. kr. og eftir úrslitið í 99 er eginognin í felagnum komin uppá góðar 27 mill. kr. Í felagnum eru 2000 partaeigarar. Øll nevndin varð afturvald á aðalfundinum. Í henni eru Kjartan Hoydal, nevndarformaður, Óli Hammer, Poul Mohr, Mortan Johannesen og Peter Even Djurhuus, sakførari. Vilhelm Petersen heldur fram sum stjóri.

# Heimasíður verða sambindingarliður

*Føroysk lesandi uttanlands og Føroya Arbeiðsgevarafelag hava gjørt eina samstarvsavtalu, skrivar Vinnuhúsið*

Avtalan er, at føroysk lesandi skulu lýsa føroysk viðurskifti, í samstarvi við føroyskar fyritøkur og stovnar, í teimum serritum og størri uppgávum, ið eru partur av lesnaðinum, um eitthvørt, ið fyritøkan hevur brúk fyri at vita meira um. Hetta átti at givið føroyskum virkjum ein møguleika at fingið gjørt kanningar ella smærri granskingar-uppgávur, uttan at brúkt stórvegis av pengi.

Ætlanin er, at Vinnuhúsið skal leggja ein link til heimasíðuna hjá teimum lesandi, á heimasíðuna hjá Vinnuhúsinum og øvugt. Heimasíðurnar skulu verða sambindingarlið millum tey lesandi og føroykst vinnulív.

**Yvirlit**

Á heimasíðuni hjá teimum lesandi ber til at finna yvirlit yvir lesandi, sum hava áhugað at skriva um ávís føroysk viðurskifti, hvat tey hava tikist við og hvørji viðurskiftið tey serliga hava áhugað fyri. Har verður eisini víst á dømi har lesandi og føroysk fyritøka hava samstarvað. Á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum verður ein talva við evnum, sum tey lesandi kunnu taka útgangsstøði í, áðrenn tey gera av, hvat tey fara at gera uppgávur um.

Tá tey lesandi hava fingið áhuga fyri ávísum evni, fer umboð fyri Vinnuhúsið at seta seg í samband við føroyska vinnu og á henda hátt fáa í lag samband millum lesandi og vinnuna.

Virkir, sum vilja hava serliga uppgávu loysta eru vælkomin at seta seg í samband við Vinnuhúsið. Vinnuhúsið vil síðani verða við til at fáa í lag samband til tey lesandi, skrivar Vinnuhúsið.